# P-dagur í morgin

**Eitt tekin um, at várið er í nánd, er ársins páskabryggj frá Føroya Bjór. Í morgin er P-dagur, og harvið kemur ársins páskabryggj frá Føroya Bjór á marknaðin.** Nú vit nærkast ljósari tíðum, kavin bráðnbar, og várið er í nánd, er Páskabryggið hjá Føroya Bjór bryggjað. Hin fyrsta páskabjórin sá dagsins ljós í 1982. Eins og undanfarin ár, verður serliga nógv gjørt burtur úr góðskuni og smakkinum á hesum bjóri. Bjórin er bert bryggjað í avmarkaðari nøgd. Páskabryggið er rav-gylt og hevur eina góða javnvág í søtleika og beiskleika. Perfekt til páskahøgtíðina og páskaborið, og vit eru sera væl nøgd við ársins páskabryggj, siga tey av Føroya Bjór.





óvurderiligt arbeiði fyri at halda bæði teir smølu og breiðu landsvegirnar opnar, soleiðis at fólk sleppur fram og aftur kring alt landið.

Tað er kortini ikki bert um veturin, at fólk hava brúk fyri at koyra trygt. Saksun er eitt sera væl umtókt stað hjá ferðafólki, og á sumri er tað at kalla gerandissjón at síggja bussar við ferðafólkum á leiðini.

Tað er neyvan altíð so lætt hjá teimum at koyra, um teir altso ikki eru staðkendir og koyra eftir umstøðunum á hesum smala vegastrekkinum.

Hóast hetta, er Tummas ikki sannførdur um, at ein breiðking av Saksunarvegnum er tann besta loysnin. Tað er helst so sum hann sigur, at um ein breiðkar vegin, so ger ein tað samstundis lættari hjá bilførarum at koyra skjótt eftir vegnum.

- Nei, eg haldi at vegurin er nóg góður, so sum hann er. Tað kundu kanska verið fleiri møtipláss, staðfestir hann.

*Saksunarvegurin er smalur og ótíðarhóskandi. Hóast væl verður grivið henda kortini óhapp á vegnum. - Men eg haldi kortini ikki, at neyðugt er at breiðka vegin, sigur Tummas Jacobsen, bóndi úr Hvalvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*